LM-100/2020

Fylgiskjal 3

FØROYA REIÐARAFELAG

**Hoyringsskriv til uppskot um broyting í løgtingslóg um sjófeingi**

Føroya Reiðarafelag hevur fingið uppskot til broytingar í sjófeingislógini til hoyring og hevur hesar viðmerkingar til uppskotið.

Broytingar nr. 1-4 snúgva seg í høvuðsheitum um, at landsstýrismaðurin fær nýggja heimild at krevja upplýsingar og váttanir frá rættindahavarum í samband við eftirkanning av treytum viðvíkjandi útlendskum ognarskapi. Reiðarafelagið hevur ongar viðmerkingar til hesar broytingar.

Broytingarnar nr. 6 til 13 snúgva seg í høvuðsheitum at linka um krøvini til, at føroysk fiskifør skulu hava veiðiloyvi, tá ið tey søkja um at lut í kvotum, ið verða latnar við støði í §§ 49 og 50. Reiðarafelagið tekur ikki undir við, at hesi krøv verða linkað.

Saman við manningarfeløgunum var Reiðarafelagið forsprákari fyri, at skipanin við veiðiloyvum aftur varð sett í verk, og hetta varð gjørt við nýggju sjófeingislógini. Við hesi lógarbroyting verður henda skipan aftur niðurlagað, og hetta kann hava óhepnar avleiðingar fyri fiskiflotan.

Ítøkiliga verður skotið upp at linka treytirnar viðvíkjandi veiðiloyvi, tá ið søkt verður um kvotur av svartkjafti, norðhavssild og makreli til vinnuligar royndir og verkætlanir. Hetta er tann størri parturin av kvotuni til vinnuligar royndir og verkætlanir, sum er skipaður í §49, stk. 1 í lógini. Ongar broytingar verða gjørdar viðvíkjandi ískoytiskvotunum í §49, stk. 2.

Hesar kvotur kunnu nú latast umsøkjarum, ið hava ítøkiligar ætlanir um at keypa skip, uttan at rættindahavarin hevur veiðiloyvi frammanundan. Endamálið við uppskotinum er, at nýggir aktørar við egnum fiskiførum kunnu sleppa framat fiskirættindum uttan at hava skip við veiðiloyvi.

Talan er frammanundan um eina sera avmarkaða kvotu, ið verður latin til vinnuligar royndir og verkætlanir, og nú er ætlanin, at enn fleiri umsøkjarar skulu fáa atgongd til hesa kvotu. Vandin er, at kvotan, ið frammanundan er avmarkað, verður ógvuliga smábýtt, tá ið hon skal latast fleiri rættindahavarum.

Í fjør vóru til dømis sett av 4.260 tons av makreli og 8.095 tons av norðhavssild til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært §49, stk. 1. Kvotan er sostatt frammanundan avmarkað og ætlað smærri reiðaríum, ið frammanundan hava minni enn 8% av heildarkvotuni av hvørjum fiskaslagi sær.

Sambært viðmerkingunum var endamálið við útluting av kvotum í §49 upprunaliga *"at styrkja um teir veikaru partarnar av vinnuni"* og *"at lata lata ein part av kvotunum til at styrkja um kvotugrundarlagið og stuðla undir burðardyggari rakstri hjá fiskifari."* Tí kann sigast, at hesar broytingar stríða ímóti endamálinum við ásetingini, um alsamt fleiri skip skulu fáa part av hesi avmarkaðu kvotu. Vandin er, at meira fiskiorka verður sett inn í uppsjóvarflotan, og tað hevur avgjørt neiligar avleiðingar fyri verandi skip.

Reiðarafelagið vísir á, at landsstýrismaðurin longu hevur møguleika fyri at veita undantak frá regluni um veiðiloyvi. § 49, stk. 5 sigur, at landsstýrismaðurin í serligum førum kann geva undantak frá kravinum um veiðiloyvi, og líknandi regla er fyri royndarfiskiskap í § 50, stk. 2.

Boks 361 • Óðinshædd 7 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 73 99 12 • Teldupostur: stefan@industry.fo

Samanumtikið mælir Reiðarafelagið staðiliga frá, at krøvini til veiðiloyvi verða linkað, og at hesar broytingar verða strikaðar úr uppskotinum.

Føroya Reiðarafelag, 25. januar 2021

Stefan í Skorini, stjóri